Útróðrarbátur:

# Helt vaktartænastuna fyri gjøldur

LEITING
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Útróðrarbáturin Eldorado helt, uttan at vita tað, vaktartænastuna fyri gjøldur mikukvøldið, tá stór leiting varð sett í verk, tí útróðrarbáturin ikki hevði VHF ella telefon frá.



*Eldorado var komin frám á Almu J. Sum hevði fingið motorskaða, tí varð hann so nógv seinkaður til Klaksvíkan, at fólk vóru bangin um hann*

*Mynd: Skipalistin*

Útróðrarbáturin Eldorado var farin av Borðoyarvík klokkan fimm seinnapartin mikudagin og skuldi á Klaksvík. Hesin túrurin tekur vanliga ikki meira enn ein klokkutíma, alt eftir streymi, men klokkan 10.00 í mikukvøldið var báturin ikki framkomin. Tá boðaðu avvarðandi Vaktartænastuni frá og Brimil og Tjaldrið fóru beinanvegin at leita. Eisini fór Alfapilot, ein bjaragingarbátur úr Klaksvík at leita.

Tríggjar tímar seinni, um eitt tíðina, komu leitingarskipini fram á Eldorado. Hann hevði verið fastur í og hevði sleipað útróðrarbátin Alma J. úr Funningsfirði. Alma J. hevði fingið motorskaða, sigur vakthavandi á Vaktartænastuni.



*Alfapilot luttók í leitingini*

*Mynd: Skipalistin*









# Dómarin trúði ikki ákærda

**Hóast 31 ára gamli maðurin, sum mánadagin 19. november varð tikin við 5 kilo av hassji í bilinum, ikki vildi kennast við rúsevnini, fekk hann eitt ára treytaleysa fongsulsrevsing. 19 ára gamla kvinnan, ið var við í bilinum, varð fríkend**

SMUGLING
*Stefan í Skorini*

Bæði maðurin og kvinnan noktaðu seg sekan, eftir at dómarin hevði lisið ákæruritið upp fyri teimum. Tey vórðu bæði ákærd fyri at hava brotið lógina um euforiserandi rúsevni. Ákærin vildi hava tey dømd fyri at hava smuglað ólóglig evni til landið við tí fyri eyga at selja tey víðari í Føroyum.



*Maðurin, sum vendir nakkan til, varð funnin sekur í at hava smuglað rúsandi evni og við sølu fyri eyga. Hann skal inn at sita í eitt ár og skal harumframt rinda sakarmálskostnaðin. Tann unga kvinnan varð ikki funnin sek. Aftanfyri stendur løgreglumaðurin, ið hevði málið um hendi*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Kendi ikki til hassjið

Rættarfundurin vardi í heilar seks tímar, hóast einki vitni varð innkallað. Eftir at hava hugsað seg um í nakrar tímar, kunngjørdi dómarin dómin klokkan seks mikukvøldið.

Maðurin varð funnin sekur í ákæruni, og hann skal inn at sita í eitt ár. Kvinnan varð funnin ósek í ákæruni og kann fara heim beinanvegin.

Maðurin vildi vera við, at hann einki kendi til hassjið, ið varð goymt í eykahjólinum á bilinum, ið varð leigaður í Danmark.

Dómarin metti, at frágreiðingin hjá manninum varð óálítandi, at hann í veruleikanum visti um rúsevnini í hjólinum, og at hann hevði sølu fyri eyga. Tí varð hann funnin sekur. Umframt at skula í geglið skal maðurin gjalda sakarmálskostnaðin úr egnum lumma.

Dómarin vísti hinvegin á, at vantandi prógv vóru fyri, at kvinnan visti um hassjið. Tí varð hon fríkend. Hon kann nú krevja endurgjald fyri ta tíðina, hon sum ósek hevur sitið í varðhaldinum.

Eftir dómin tosaði tann dømdi við verjan. Eftir prátið boðaði hann frá, at hann ikki fer at skjóta dómin inn fyri hægri rætt, men tekur við honum.

## Aftur í varðhaldið

Eftir dómin kravdi ákærin, at maðurin verður settur aftur í varðhaldið beinanvegin, áðrenn hann fer at sita dómin. Orsøkin var, at maðurin fleiri ferðir fyrr er dømdur fyri brot á lógina um euforiserandi evni. Seinast fyri einum ári síðani.

Ákærin vísti á, at stórur vandi tí er fyri, at maðurin heldur fram við at fremja somu lógarbrot. Harumframt er kanningararbeiðið ikki liðugt enn, og við atliti til hetta arbeiðið hevði verið best, um maðurin aftur varð settur í varðhaldið.

Verjin mótmælti og segði, at eftir ein so harðan dóm er eingin vandi fyri, at maðurin heldur fram við somu lógarbrotum. Harumframt var ætlanin, at maðurin skuldi halda jól við sínum tveimum børnum. Dómarin gjørdi av, at varðhaldsfongslingin heldur fram, til hann skal sita tann veruliga dómin. Hesin úrskurður varð heldur ikki kærdur til Landsrættin.

Eftir kravi frá verjanum varð harumframt lagt hald á 12.000 krónur, ið maðurin hevði við sær til Føroyar. Hesin peningur skuldi nýtast til sakarmálskostnaðin. Verjin vísti á, at maðurin onga almenna inntøku hevur, og tí hevði verið óvist, um statskassin nakrantíð fór at fáa peningin fyri sakarmálið.

## Afturlatin rættarfundur

Eftir at hava sitið í varðhaldinum í ein mánað komu tann 31 ára gamli maðurin og tann 19 ára gamla kvinnan, sum bæði eru í Danmark, fyri rættin mikudagin. Tey vórðu tikin 19. november, eftir at tollarar funnu góð 5 kilo av hassji í einum eykahjóli, ið hekk undir bilinum, tá tey komu í land úr Norrønu.

Rættarfundurin varð hildin fyri afturlatnum hurðum, tí kanningarnar hjá løgregluni í hesum málinum enn ikki eru lidnar. Ákærin nevndi, at persónar í Danmark, sum løgreglan hevur illgruna til, ikki eru funnir enn. Tí hevði tað verið óheppið, um smálutir vórðu avdúkaðir á einum opnum rættarfundi.

Dómarin tók undir við hesum sjónarmiði, og verjin hevði ongar viðmerkingar til ynskið hjá ákæranum.

Tey hava verið varðhaldsfongslað síðan 19. november, og fyrstu tvær vikurnar vóru tey avbyrgd, so tey ikki skuldu hava møguleika at ávirka møgulig vitni og hvønn annan. Maðurin varð síðani avbyrgdur í nakrar dagar afturat, tí hann varð undir høvuðsillgruna.

Ein 46 ára gamal maður úr Føroyum eru eisini skuldsettur, men hann er leyslatin aftur eftir at hava verið avhoyringar.

31 ára gamli danin fer væntandi til Danmarkar at sita dómin av sær.

## 54 narkomál í fjør

HAGTØL
*Stefan í Skorini*

Í skrásetingunum yvir fráboðanir til kriminalløgregluna sæst, at talið av fráboðanum um brot á lógina um rúsevni, sum løgreglan hevur kannað nærri, var tilsamans 54 í fjør. Hetta er ein lítil vøkstur frá 1999, tá løgreglan kannaði 50 mál av slíkum slag. Í 1998 var talið av slíkum fráboðanum 42, í 1997 var talið 49 og í 1996 vórðu 52 mál um brot á lógina um rúsevni fráboðað løgregluni.

Hesi hagtøl, sum eru fingin úr Árbókini, snúgva seg um fráboðanir, sum løgreglan hevur kannað nærri og ikki um rættarmál.

Tað sæst hinvegin ikki, hvussu nógvir persónar av teimum kannaðu í veruleikanum eru dømdir fyri lógarbrotið, ið teir eru undir illgruna at hava framt.